# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# ALMENT OYÐSL OG PRIVAT SKRÆDL

Í gjár legði Búskaparráðið fram heystfrágreiðing sína. Tað er altíð áhugavert at frætta, hvat Búskaparráðið heldur um førda fíggjarpolitikkin. Sláimaskinan - og »plenuklipparametodan« vóru tí eisini á breddanum í gjár, har Búskaparráðið vísir á, at hendan tíðin er farin. Nú mugu vit velja, hvørjar tænastur, vit vilja veita, og hvørjar tænastur vit skulu gjalda fyri. Og so verður eisini nevnt at breiðka skattagrundarlagið við tilfeingisgjaldi og ognarskatti og at skipa fiskivinnuna, so hon virkar eftir marknaðarligum treytum. Júst almenna umsitingin av fiskivinnuni er eitt skúladømi um, hvussu vit IKKI skulu gera.

Mánadagin frættist eisini, at Kappingarráðið hevur álagt Fiskimálaráðnum bót, um ráðið ikki útvegar skjøl, sum skjalprógva útrokningarháttin í sambandi við trygdarskeið á Trygdardeplinum í Klaksvík. Kæra er komin, tí at privati Sjódepilin í Havn kennir tað sum kappingaravlaging, at almenni stovnurin í Klaksvík kann veita hesi skeið langt undir kostprís. Men Fiskimálaráðið vil ikki svara, og nú hevur Kappingarráðið mist tolið. Eru prógvini ikki komin innan 11. november, so fær Fiskimálaráðið bót hvørja viku.

Tað er ikki sørt marghháttligur politikkur, at tað almenna gongur á odda at stuðla undir kappingaravlaging á henda hátt. Vit hava fyrr nevnt okkara egnu støðu, har mentamálaráðharrin ikki vil fylgja tingsins vilja og steðga kappingaravlagingini við, at alment fíggjaða kringvarpið kappast móti privatum miðlum, og harvið selur lýsingar fyri undirprís.

Tað eru so mong onnur dømi. Posta, sum við eini 40 almennum milliónum við risa undirskoti hvørt ár kann kappast við privatar flutningsfyritøkur, meðan spart verður á økinum, har Posta hevur monopol.

Her ruggar ikki rætt. Politikarar, sum kalla seg liberalar, føra kommunistiskan politikk. Er tað tí, at landsstýrisfólkini als ongar vinnulívsroyndir hava, og at tey tí als ikki skilja, hvussu vinnulívið



fungerar? Ella er tað lokalpolitisk/partapolitisk áhugamál, sum kanska enn hava størri ávirkan, hóast landið er eitt valdømi?

Tá vit nú skulu venda hvørjum oyra uppaftur meira enn áður, so gevur tað als onga meining at brúka almennar pengar til at leggja fótonglar fyri privatum vinnuvirksemi. Slíkt er beinleiðis tápuligt og óbúgvið. Sjálvandi eru tað uppgávur, sum tað almenna skal taka sær av - og tað eru eisini uppgávur, sum bæði tað privata og tað almenna skulu taka sær av. Men so er at skipa viðurskiftini soleiðis, at báðir partar hava somu treytir.

Soleiðis skaptu vit eina win-win støðu, sum gagnaði samfelagnum og spardi landskassanum pengar.

## Kanska landsstýrisfólkum vantar vinnuroyndir

# Arrogantir tungvektarar



*Frá Hvonn Live sending í september í fjør, tá tríggir floksformenn vildu møta til politiskt orðaskifti*

Í táttinum hjá Kringvarpinum, har tey spyrja blaðstjóra á Dimmalætting um ymiskt, var evnið í Degi og Viku í gjárkvøldið, hvussu niðursetandi framferðarháatturin hjá Jóannes Eidesgaard og Johan Dahl eru. Jóannes Eidesgaard segði á tingsins røðarapalli, at hann vónaði ikki, at vit fingu eina nýggja bankakanning, tí seinast, vit høvdu eina slíka, førdi tað til, at Høgni Hoydal varð valdur á ting. Hetta helt blaðstjórin á Dimmu vera arrogant, nonsjalant og tekin um, at Jóannes Eidesgaard hevur verið ov leingi í politikki

Johan Dahl segði í sjónvarpinum herfyri í málinum um Skráseting Føroya, at hann »refereraði ikki til tin eina kontórdamu á gólvinum, men bara til stjóran«. Hetta helt blaðstjórin vera »fullstendiga undir beltið«:

-Hann er landsstýrismaður í javnstøðumálum og úttalar seg um »kontórdamuna á gólvinum«. Hevði hatta verið í Svøríki, so varð hann koyrdur frá, segði hon.

Jú, arrogantir eru okkara politikarar so mangan, so tað er bara gott, at slíkt kemur fram. Hevði sjónvarpið spurt um hetta á okkara redaktión, so kundu vit fortalt teimum, at Jóannes Eidesgaard tímir ikki at luttaka í einum politiskum kjaki á Hvonn Live sendingini hjá Rás2 komandi leygarkvøld, tí hann »tímir ikki at luttaka í sending, sum bara hevur til endmáls at fylla eina kafé«.

Og løgmaður hevur heldur ikki stundir at vera við - og tað er aðru ferð, at hann gevur avboð til politiskt orðaskifti á Hvonn Live. Meðan Eidesgaard sendir næsta fólk sítt, Helenu Dam á Neystabø, hevur løgmaður enn ongan vat at senda fyri seg.

Hvør skal siga. Hava teir gloymt, hvønn teir umboða?

Arrogant? Ja!

Nonsjalat? Ja!

Virðiligt: NEI!

Hetta skriva vit okkum sjálvandi aftan fyri oyrað...



## Turt at svimja í Runavík

JON HESTOY
KJAK Á SÍÐU 15



## Hví er Høgni so stuttligur?

JÓGVAN VIÐ KELDU
KJAK Á SÍÐU 14

# Umskipanir í uttanríkisráðnum



Fýra av seks deildin í Uttanríkisráðnum verða nú avtikinar, og starvsfólk hava fingið ætlarnarskriv um broytingarnar.

Uttanríkisráðið boðar í kvøld frá, at ætlanir eru at broyta bygnaðin í ráðnum.

Orsøkirnar til hesar ætlanir sigur ráðið verða, at ynski er um, at Uttanríkisráðið fær størri eindir, enn ráðið hevur havt seinastu árini, og at nýta starvsfólkahópin, ið Uttanríkisráðið hevur í dag, enn betur, soleiðis at ráðið gerst enn virknari og kemur at virka á bestan hátt.

Starvsfólk í ráðnum hava í dag fingið handað ætlanarskriv, har ið tey verða hoyrd um ætlaðu broytingarnar, soleiðis sum ásett er í fyrisitingarlógini.

Tær bygnaðarbroytingar, ið ætlanir eru um, eru at avtaka fýra av teimum seks deildunum. Tey starvsfólk, ið eftir ætlan verða ávirkað av hesum broytingum, hava kortini fingið tilboð um annað starv í Uttanríkisráðnum.

Ætlanin er at seta tvær nýggjar deildir á stovn. Onnur deildin fer at marknaðarføra Føroyar, serliga sum ferðamál. Hin deildin fer at samráðast um handil og tilfeingi.

Tað er ætlanin at lýsa leys hesi bæði nýggju deildarstjórastørvini í næstum.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*